Johnhard Klettheyggj
Løgfr.

**Løgtingsins umboðsmaður 10 ár – ”Hvat hava vit nátt hesi 10 árini ?”**

Sum fyrsti fulltrúi hjá Løgtingsins umboðsmanni er fallið mær í lut at siga nøkur orð í sambandi við hendan 10 ára hátíðardagin. Og hetta er mær ein stórur heiður.

**Byrjanin**

Eg minnist væl, tá Jenis av Rana legði fram uppskotið um at seta á stovn Løgtingsins umboðsmann. Eg minnist eisini mangt kjakið millum okkum løgfrøðingar, hvussu mundið fara at vera við hesum uppskoti, og hvussu lagnan hjá hesum embæti mundi fara at gerast. Samanberingar vóru gjørdar við landsstýrismálanevndina og tað rok, sum ofta stóðst av niðurstøðum hennara. Eg minnist serliga ein advokat (er hann nevndur er hann kendur), sum hevði á munni, at tað fór at verða ein ómøgulig uppgáva at fáa hetta embætið at virka við teirri syndarligu fyrisitingini, sum vit høvdu. Men nú standa vit so her, og 10 ár eru farin.

Virksemið byrjaði offisielt 1. mai 2001, tá Jógvan Andreasen tók við embætinum, men ein mánað frammanundan fóru eg og skrivstovufulltrúin, Laila Egholm til verka. Vit byrjaðu á berum botni á skrivstovuni, sum var í hølunum hjá Realinum í Niels Finsensgøtu. Har var einki – eingin telefon og eingin telda – so hetta var ein løgin støða fyri okkum, sum vóru von við, at allir slíkir hentleikar vóru tøkir. Men tað gekk skjótt, og tá Jógvan tók við embætinum, var tað mesta klárt, soleiðis at farast kundi til verka. Eg haldi, at journalskipanin var tað einasta, sum ikki var klár.

Fleiri spennandi mál lógu eisini og bíðaðu okkum. Tað mest kontroversiella av hesum var helst setanin av nýggjum stjóra fyri Landsverkfrøðingsstovnin. Eg fari seinni at taka í onkur av hesum málum, sum kanska hava havt serligan týdning fyri menningina av fyrisitingarrættinum í Føroyum. Og eg haldi ikki, at eg sigi for nógv, tá eg sigi, at embætið hevur gjørt mun, og í hvussu er hevur sett fokus á nøkur ting, sum man ikki tók so tungt í fyrisitingini frammanundan.

**Embætið**

Sum vera man var ta fyrstu tíðina umrøtt, hvussu embætið skuldi skipast, og hvussu markamótið var til aðrar instansir, herundir serliga Løgtingið og Landsstýrismálanevndina. Sum heitið leggur upp til, so er umboðsmaðurin eitt av eftirlitunum hjá Løgtinginum við fyrisitingini. Hann er óheftur av Løgtinginum í virksemi sínum í einstøku málunum, men Løgtingið kann ávirka leiklutin hjá umboðsmanninum generelt. Hetta hava vit sæð nøkur dømi um í Danmark, har tingið í fíggjarlógini hevur økt játtanina og sett út í korti nøkur fokusøkir, sum tingið vildi hava umboðsmannin at geva serligan ans. Sum dømi um hetta kann eg nevna handicap-atkomumøguleikarnar til almennar myndugleikar og stovnar. Hetta kundi eisini verið gjørt í Føroyum, men tað er ikki gjørt enn.

At umboðsmaðurin er óheftur av tinginum krevur eisini, at embætið hevur eina játtan til tað virksemið, sum skal vera. Tí um dagligi raksturin kemur í ta støðu, at hann kann vera tengdur at, hvørt eykajáttan kann fáast, so er embætið pr. definitión ikki longur óheft.

Eg havi millum fólk ofta hoyrt sagt, at umboðsmaðurin ikki kann gera nakað, tá veruliga á stendur. Hann kemur við einari átalu, og so var tað tað. Onkur hevur hildið, at umboðsmaðurin heldur skuldi

havt karakter av einum fyrisitingardómstóli, soleiðis at hann kundi broytt skeivar avgerðir. Spurningurin er, um hetta er ein veikleiki ? Eftir mínum tykki er ta júst øvut.

Øll skipanin við umboðsmanninum leggur upp til, at umboðsmaðurin skal meta um og koma við tilmælum ella áheitanum, t.d. um at viðgera mál umaftur ella at umhugsa mannagongdir. Á hendan hátt er lagt upp til, at umboðsmaðurin fær eitt slag av einum mentor skipan í mun til fyrisitingina, og at tað verður eitt slag av sjálvjustits hjá fyrisitingini, sum so sjálv kann rætta síni mistøk. Men um hendan skipan skal virka eftir ætlan, so krevur hetta, at fyrisitingin er búgvin til at viðurkenna møguligar feilir og at rætta teir.

Skipanin krevur eisini, at politiska skipanin er búgvin. Tá umboðsmaðurin rakar við álvarsom lýti ella mistøk skal hann sambært lógini boða formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og avvarandi landsstýrismanni frá hesum. Harvið verða hesir partar óbeinleiðis drignir inn í málið. Tankin er, at landsstýrismaðurin kann halda í oyruni á fyrisiting sínari, løgmaður í oyruni á landsstýrismanninum, og tingið í seinasta enda kann halda í oyruni á løgmanni. Hetta kann gerast á tann hátt, at um upplagdir feilir ikki verða rættaðir ella ivasamar mannagongdir broyttar, so kann hetta í seinasta enda fáa politiskar avleiðingar.

Tá nú lógin leggur upp til hesa fráboðanarskipanina í politiska landslagnum, so haldi eg tað vera sera óheppið, sum tað onkuntíð er komið fyri, at tingformaðurin beinanvegin í samband við ávís mál, sum hann er kunnaður um, í fjølmiðlunum boðar frá, at tingið ger í hvussu so er einki við niðurstøður umboðsmansins. Eg haldi at tingformaðurin í slíkum førum er við til at undirgrava embætið. Eg veit væl, at tingið skal einki gera beinanvegin, men geva fyrisitingini møguleika at finna útav hesum sjálv. Men tað er heldur eingin orsøk til, at koma við hesum útmeldingum og harvið signalera, at fyrisitingin ikki nýtist at taka umboðsmannin fyri fult.

Tá umboðsmaðurin hevur gjørt sítt arbeiði og boðað frá sínari støðu til omanfyri nevndu myndugleikar, so er arbeiðið hansara liðugt. Tað er ikki trupulleikin hjá umboðsmanninum, um niðurstøður hansara ikki verða fylgdar í tí einstaka málinum. Men sjálvandi skal hetta ikki vera gerandiskostur, tí so er embætinum ikki lív lagað.

Heldur fyrisitingin fast við sítt og ikki vil broyta eina avgerð, t.d. tí at hon heldur umboðsmannin hava mistikið seg, so kann umboðsmaðurin viðmæla borgaranum fría rættarførslu fyri at fáa málið avgreitt í rættinum, og harvið fáa eina endaliga niðurstøðu.

Tá alt hetta er sagt, so kann ein kanska fáa ta fatan, at fyrisitingin í dag virkar illa og ikki virðir umboðsmannin. Men hetta er als ikki mín fatan - tvørturímóti.

**Virksemið**

Tað eru serliga tvey sløg av málum, sum hava fylt nógv hjá umboðsmanninum hesi 10 árini; starvsfólkamál og innlitsmál. At hesin seinni bólkurin hevur fylt nógv, er avgjørt ikki løgið, og fleiri orsøkir eru til tess.

Tá borgarin ella fjølmiðlarnir ikki hava fingið innlit í umbiðin mál hjá miðfyrisitingini ella kommununum, so eru møguleikarnir antin at fara í rættin ella til umboðsmannin. Men rætturin er í veruleikanum ikki eitt val í slíkum førum, tí at hetta er ein dýr og tung viðgerð, meðan umboðsmaðurin er ókeypis og munandi lættari atkomiligur. Hetta er einki eindømi í Føroyum, og

av somu orsøk eru tað eisini umboðsmenninir heldur enn rætturin, sum í norðanlondum hava lagt linjuna fyri, hvussu innlitslógin skal tulkast.

Ofta hava hesi innlitsmálini snúð seg um, at myndugleikarnir als ikki svara innlitsumbønum ella hava drálað so leingi, at endamálið við innlitsumbønini fór fyri skeytið, og í slíkum førum er umboðsmaðurin ein effektivur instansur. Tað eru ikki so fá dømi hjá umboðsmanninum, har innlitsumbønirnar eru viðgjørdar ella viðgjørdar av nýggjum, tá umboðsmaðurin hevur sent myndugleikanum klaguna til ummælis.

Tað er mín fatan, at partar av fyrisitingini eisini hava havt ein heldur ivasama fatan ella hugburð í mun til innlitsmál og harvið innlitslógina. Eg havi í nógv ár undirvíst í almennum innliti og havi ikki so sjáldan møtt einum hugburði, serliga millum eldra ættarliði í fyrisitingini, og kanska serliga teirri kommunalu fyrisitingini, at hesar reglur eru tað reina fjas og tíðarspilla. Hetta er ein sera vandamikil hugburður í einum demokratiskum samfelag, men tíbetur eisini ein fjarandi hugburður. Og her hevur umboðsmaðurin avgjørt havt ein týðandi leiklut, og hetta er eisini nakað, sum eg ofta havi hoyrt fjølmiðlafólk hava havt á orði.

At hesin hugburður hevur verið til staðar, og tað at innlitsmál hava fylt so nógv hjá umboðsmanninum, hongur kanska eisini eitt sindur saman við, at innlitslógin framvegis var rættiliga nýggj í Føroyum. Hon kom í gildi í 1994 og hevði sostatt bara 7 ár á baki, tá umboðsmaðurin byrjaði. Til samanberingar kann nevnast, at í Danmark kom innlitslógin í 1970, meðan sviar fingu sína fyrstu innlitslóg longu í 1700'talinum.

Nakað annað, sum eg eisini havi hoyrt frá útinnandi valdinum er, at tey í sambandi við alment innlit eru eitt sindur stúrin fyri at fara yvir um mark, tá ræður um tagnarskylduna, og at tey tí aftra seg við at geva innlit. Eg skilji væl henda óttan hjá tí einstaka, sum ikki kennir reglurnar til fulnar, men hetta kann ikki vera ein kollektiv støða fyri ein heilan myndugleika.

Eg rokni tó avgjørt við, at tað við tíðini fara at vera alsamt færri mál hjá umboðsmanninum, sum snúgva seg um alment innlit. Hetta kemur at henda saman við tí økta kunnleikanum og tilvenjingini hjá fyrisitingini til lógina. Ein broyting, har umboðsmaðurin avgjørt hevur havt og hevur ein neyðugan leiklut. Men niðurstøðurnar í kannaðu málunum hava avgjørt eisini víst, at her hevur tørvur verið á umboðsmanninum.

Tá tað nú eru fleiri politikarar til staðar her í dag, fari eg eisini at nýta høvi at nevna, at okkara innlitslóg trongir til ábøtur. Her hugsi eg serliga um, at okkara lóg er avskrivað eftir donsku lógini, sum kom í gildi í 1987; men at danir í 1998 strammaðu lógina, tá ræður um innlit í starvsfólkamál. Hetta hevur serliga týdning fyri uppsagnarmál, har innlitsreglurnar hjá okkum eru munandi opnari enn í Danmark. Fýrakantað kann sigast um munin, at tað í Danmark bert er innlit í uppsøgn av leiðandi starvsfólkum, og bert í 2 ár roknað frá uppsøgnini. Hjá okkum, eru øll uppsagnarmál fevnd av innliti, og tað næstan bert eru viðurskifti, sum viðvíkja privatlívinum hjá tí einstaka starvsfólkinum, sum kunnu grunda, at innlit ikki verður givið. At samfelagið er so lítið, ger, at hetta er ella kann vera serliga tyngjandi í Føroyum. Eg havi í tveimum málum hjá umboðsmanninum sæð, at myndugleikar hava roynt at nokta innliti við grundgeving í donsku lógini heldur enn teirri føroysku; men hetta hjálpir einki, so leingi okkara lóg er sum hon er.

Ein annar munur, sum ikki kann forklárast beinleiðis, er, at í Danmark eru revsimál undantikin innliti, men hetta er ikki við í føroysku lógini. Eg giti, at tá okkara lóg var gjørd, hevur man hugsað

sum so, at revsimál eru danskt málsøki og tí ikki viðkomandi fyri føroysku lógina. Men í dag byrja fleiri revsimál hjá føroyskum myndugleikum, t.d. sum eftirlitsmál, og tí er lóggávan ymisk í mun til innlit. Hetta merkir, at málini kunnu vera opin fyri innliti, inntil tey vera latin fútanum, tá danska lógin tekur yvir, og lokar málini.

Starvsfólkamálini hava sum nevnt eisini fylt rættiliga nógv; bæði tá ræður um setanarmál og uppsagnarmál.

Í hesum málunum eru tað serliga reglurnar um grundgeving, sum eg haldi hava verið trupulleikin. Gamla siðvenjan við at svara vrakaðum umsøkjarum stutt við at takka fyri áhugan, og at starvið er sett við øðrum umsøkjara, var javnan at síggja fyrstu árini, men hetta er avgjørt blivið betur við tíðini. Hetta var eisini tað, sum umboðsmaðurin fanst at í áður nevnda málinum um setan av stjóra fyri landsverkfrøðingsstovnin. Í hesum málinum setti umboðsmaðurin kanska eisini ein nýggjan standard í mun til grundgeving; nevniliga at tá kringumstøðurnar vóru soleiðis, sum tær vóru í tí málinum, máttu serlig og herd krøv setast til grundgevingina. Umboðsmaðurin legði dent á, at talan var um fyrrverandi stjóran gjøgnum 10 ár, og sum annars hevði starvast á stovninum í 23 ár, og sum sambært skjølunum einans var uppsagdur tí 2 stovnar skuldu leggjast saman. Umboðsmaðurin helt tí málið vera so serligt, at tað ikki hevði verið nokk at sagt, hví annar umsøkjari var settur, ið annars vanliga er ein nøktandi grundgeving. Men at fyrrverandi stjórin hevði krav uppá eina grundgeving fyri, hví júst hann ikki fekk starvið.

Í sambandi við uppsagnarmál hava vit eisini sæð dømi um avgerðir, ið byggja á eina heildarmeting, uttan at komið verður inn á, hvat hesar heildarmetingar fevna um. Hetta er heldur ikki nøktandi.

Onkur setanarmál hava verið so fongd við feilum, at umboðsmaðurin hevur mælt til, at tey skuldu viðgerast umaftur, hóast størvini vóru sett. Tað skal sjálvandi nógv til, áðrenn umboðsmaðurin kemur til hesa niðurstøðu, men við hvørt slepst ikki undan, um nakað trúvirðið skal vera í skipanini. Mær rennur í hesum sambandi serliga til hugs málið um setan av leiðara fyri frítíðarskúlan hjá Tvøroyar kommunu, har kommunan hevði vrakað ein pedagog og sett ein lærara í starvið, hóast dagstovnalógin greitt segði, at leiðarin skuldi vera pedagogur. Tá komið var til grundgevingarnar fyri hesum, gjørdist støðan uppaftur verri; onkrar grundgevingar vóru enntá framleiddar til endamálið og høvdu ikki hald í veruleikanum. Hetta málið var hóast hart stríð tikið uppaftur og onnur loysn funnin.

Eitt annað mál, sum rennur mær til hugs, var málið um setan av umhvørvisleiðara fyri kommunalu brennistøðina í Tórshavn. Har var bert ein umsøkjari, sum leyk tey settu førleikakrøvini, men hon var ikki boðin til setanarsamrøðu. Talan var um kvinnu av útlendskum uppruna. Tá umboðsmaðurin spurdi nærri um grundgevingarnar, var svarið m.a., at kommunan ivaðist í málsliga førleika hennara, hóast einki var í málinum, sum bendi á hetta, annað enn at umsøkjarin hevði skrivað, at móðurmál mítt er spanskt, men eg veri alsamt betri til føroyskt. Kommunan hevði einki gjørt fyri at kanna hetta nærri, og til hetta hevði ein setanarsamrøða avgjørt verið eitt gott amboð. Hóast áheitan frá umboðsmanninum vildi kommunan ikki taka málið uppaftur, tó at hon viðurkendi feilin. Umboðsmaðurin var tí sinnaður at viðmæla fría rættarførslu í hesum máli, men borgarin hevði fingið annað starv, og ynskti ikki at gera meira við tað.

Spurningurin er so í slíkum máli – **hevur umboðsmaðurin tapt ?**

Svarið er avgjørt: Nei; tað eru almennu Føroyar, tað útinnandi valdið, land ella kommuna, sum ikki megnar at liva upp til egin ideal, lóggávu og krøvini til sakliga fyrisiting. Í slíkum førum er taparin rættarsamfelagið, tí álitið á fyrisitingina verður skatt.

Ein annar og nógv meira álvarsamur feilur í málsviðgerðini er, tá myndugleikar lata vera við at fremja neyðugu partshoyringina. Hetta sigi eg, tí partshoyringin er avgjørt nógv tann týdningarmesta reglan í øllum fyrisitingarrættinum, ein sonevnd garantiforskrift. Hetta er aldargamla prinsippið um, at eingin má dømast óhoyrdur. Tá upplýsingar eru í einum máli, sum parturin ikki veit um, og sum ikki eru til hansara fyrimuns, so hevur hann ongan møguleika at verja seg fyri hesum. Hetta hava vit eisini sæð fleiri dømi um í virkseminum hjá umboðsmanninum.

Mær kemur til serliga til hugs tvinnandi mál; ein starvssetan hjá ALS og 3 uppsagnir á Matrikulstovuni.

Í setanarmálinum hevði ALS lógliga fingið upplýst frá fyrrverandi arbeiðsgevara, at umsøkjarin var ikki ein sum skundaði sær (men arbeiddi seint). Umsøkjarin, sum annars útbúgvingarliga var best kvalifiseraður og tí kanska eisini mettur at vera yvirkvalifiseraður til starvið, fekk ongan møguleika at verja seg fyri hesum uppáhaldi, men fekk eina innballaða og eftir mínum tykki ullinta grundgeving, har evnini at arbeiða skjótt, vóru nevnd sum eitt av fleiri kriterium fyri at seta annan umsøkjara. At arbeiðsgevarin hevði fingið hesar upplýsingar og lagt dent á tær, kom ikki undan kavi fyri umsøkjaranum, fyrr enn undir viðgerðini hjá umboðsmanninum av málinum. Eg veit ikki rættiliga, hvussu hetta málið endaði, tí umboðsmaðurin hoyrdi ikki aftur frá klagaranum.

Uppsagnarmálið á Matrikulstovuni snúði seg um uppsøgn av trimum førleikaskerdum fólkum í sambandi við bygnaðarbroytingar. Í partshoyringini fingu tey bert heilt stutt at vita, at grundgevingin fyri ætlaðu uppsagnunum var bygnaðarbroytingar, og at hetta kom at viðføra færri starvsfólk í teirra starvsfólkabólki. Ikki eitt orð um, hvat hesar bygnaðarbroytingar gingu út uppá, og hví tey stóðu fyri tørni til uppsøgn. Mær er sagt, at hendan uppsøgnin var framd við hjálp frá advokati, og eg veit, at annar advokatur tók sær av kæruviðgerðini vegna Innlendismálaráðið, og kom til ta niðurstøðu, at partshoyring var framd á nøktandi hátt. Umboðsmaðurin vísti á, at eitt ætlanarskriv av hesum slagi er ikki nøkur verulig partshoyring, tí parturin hevur ongan møguleika at gera viðmerkingar, um hann ikki kennir ætlaðu broytingarnar. Hesar uppsagnirnar vóru seinni ógildaðar. Um umboðsmaðurin ikki var komin uppí, so hevði hetta málið helst enda, tá Innlendismálaráðið staðfesti uppsagnirnar í sambandi við kæruviðgerðina.

Tað at onkur fylgir við, ger at fyrisitingin óiva kýtir seg meira fyri ikki at gera mistøk, og serliga óneyðug ella býtt mistøk. Mistøk fara kortini altíð at henda; tað er natúrligt, men veruligu mistøkini eru, tá hildið verður fast við avgerðir, hóast upplagdar feilir. Her hava fjølmiðlarnir óiva ein sera týðandi og gagnligan leiklut.

**Umboðsmaðurin og fjølmiðlarnir**

Tað er mín fatan, at leikluturin hjá fjølmiðlunum í sambandi við niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum ikki skal undirmetast. Fjølmiðlarnir hava trúliga fylgt við øll árini, og hava í allar flestu førum givið rúmd fyri málum, sum eru endaði við kritikki, meðan tey málini, har einki var at koma eftir, oftast ikki eru nevnd. Men har er heldur eingin søga sum so. At fjølmiðlarnir hava fylgt so væl við, hevur serliga havt týdning á tveimum økjum.

Almenningurin hevur fyri tað fyrsta fingið eyguni upp fyri, at umboðsmaðurin er ein møguleiki, sum kanska er verdur at royna; men samstundis er hetta kanska eisini júst tað, sum heldur nøkrum fólkum frá at fara til umboðsmannin við teirra máli. Hetta eru tey, sum eru allar veikast, og sum kanska júst tí ikki megna ella orka tankan um, at teirra mál kann koma upp í fjølmiðlunum. At samfelagið er so lítið ger, at hesin vandi uttan iva er størri hjá okkum enn í grannalondunum.

Í øðrum lagi tori eg at siga, at umrøðan onkursvegna hevur skerpað fatanina av umboðsmanninum í fyrisitingini. Tí eingin myndugleiki ella málsviðgeri hevur hug til at verða hongdur út í fjølmiðlunum fyri ikki at hava gjørt tingini á nøktandi hátt. Eg veit ikki um eg skal vera so djarvur at siga, at tað kanska onkustaðni er komin ein lítil kapping í hetta at sleppa undan umboðsmansátalum, men vit hava í hvussu er hoyrt leiðsluna fyri onkra kommunu alment hava sett sær hetta sum mál. Og tá tað so hendir, at onkur annar myndugleiki fær eina átalu, so hendir tað meira enn so, at onkur glósa um hetta fellur við kaffiborðið saman við starvsfeløgunum, sum hava verið fyri hesi lagnu.

Men spurningurin um álvaran í málinum er ikki altíð tað, sum er avgerandi fyri, hvørji umboðsmansmál koma í fjølmiðlarnar. Tí kringumstøðurnar, t.d. politiska støðan, kunnu gera, at mál detta heilt burtur ímillum.

Eg minnist í hesum sambandi serliga eitt mál. Hetta er eftir mínari fatan uttan iva tann harðasta átalan, sum er givin frammanundan grannskoðaramálinum, men málið varð ikki tikið upp á tungu í fjølmiðlunum. Málið snúði seg um eina starvssetan á studentaskúlanum í Hoydølum í 2000. Rektarin gjørdi innstilling til setan, sum landsstýrismaðurin sambært lógini skuldi taka støðu til. Men longu slakar 4 vikur frammanundan, at tilmælið varð latið MMR, boðaði rektarin teimum, sum ikki vóru innstillað, frá, at tey ikki fingu starv og sendi teimum umsóknirnar aftur. Klagarin hevði varhuga av, at tað reelt var rektarin, sum setti størvini, hóast lógin segði landsstýrismaðurin. Klagarin vendi sær til Mentamálaráðið, sum við brævi undirskrivað frá aðalstjóra og landsstýrismanni boðaði frá, at setanirnar vóru avgreiddar á rættan hátt. Men tá umboðsmaðurin kom inn í málið var einki, sum bendi á nakra viðgerð í Mentamálaráðnum yvirhøvur. Har var einans tilmælið frá rektaranum, dagfest 28. juni og so setanarbrøvini hjá teimum settu, harav okkurt teirra ikki var undirskrivað fyrr enn um ársskiftið, tvs. nærum ½ ár aftaná, at viðkomandi hevði tikið við starvinum. Hetta málið var almannakunngjørt í einari tíð, tá støðan í teirri samgonguni var heldur spent, og eg giti, at tað er orsøkin til, at fjølmiðlarnir ikki góvu málinum ans.

Hetta málið var óiva eisini ein av orsøkunum til, at lógin seinni bleiv broytt, soleiðis at rektarin sjálvur fekk setanarheimildina, sum jú er upplagt. Men tá eg nevni hetta málið, so er tað fyri at vísa á, at fyrisitingin eisini tekur stig til at bøta um skipanirnar, hóast málið ikki er umrøtt í fjølmiðlunum.

Vit hava eisini sæð, at tað hevur eina ávirkan á myndugleikarnar, tá umboðsmaðurin tekur eitt mál upp til viðgerðar. Her komi eg serliga í tankar um eitt innlitsmál á mínum núverandi arbeiðsplássi. AHR hevði í tveimum umførum noktað innlit í eina frágreiðing frá aðalstjóranum um viðurskiftini í ráðnum; viðurskifti sum vóru orsøk til, at aðalstjórin segði seg úr starvi sínum. Meðan umboðsmaðurin viðgjørdi málið, valdi AHR at taka málið uppaftur til viðgerðar heilar 2 ferðir afturat, og kom so at enda fram til, at innlit átti at verða givið í partar av frágreiðingini. Umboðsmaðurin fegnaðist um, at ráðið kom til hesa niðurstøðu, men harmaðist samstundis um, at hetta ikki varð gjørt fyrr.

Tað eru fleiri onnur dømir um hetta, at myndugleikar hava endurskoðað avgerðir sínar, og hetta er avgjørt gott.

Okur hava eisini sæð, at myndugleikar ta fyrstu tíðina aftaná fyrisitingarlógina og innlitslógina ikki tóku hesar reglurnar so ógvuliga tungt. Eg komi í hesum sambandi í tankar um eitt mál hjá umboðsmanninum frá oktober 2003, sum snúði seg um viðgerðina hjá Fiskimálaráðnum í sambandi við søluna av einum útróðrarbáti. Seljarin hevði vent sær til ráðið fyri at fáa eitt skrivligt svar uppá, hví loyvi varð selt við bátinum, uttan at hann var vitandi um hetta. Ráði helt seg hinvegin hava svarað hesum spurningum munnliga, men eingi notat vóru, sum greiddu frá hesum. Ráðið greiddi umboðsmanninum frá, at notat ikki vóru gjørd frá samrøðunum, tí at mannagongdin við noteringum í sambandi við telefonsamrøður ikki var konsekvent gjøgnumførd í ráðnum. Hetta var sløk 10 ár aftaná, at innlitslógin kom í gildi. Umboðsmaðurin vísti á, at henda undanførsla ikki kundi góðtakast, og at ráðið hevði havt ríkiliga tíð at laga seg til lógarkrøvini.

Tað er mín fatan, at fyrisitingin er nógv meira vakin í dag, tá tað kemur til notatskyldu og skráseting av skjølum, og her hevur umboðsmaðurin eisini havt ein týðandi leiklut.

**Umboðsmaðurin og framtíðin**

Tað er tørvur á einum umboðsmanni; serliga í okkara lítla samfelag. Hesa fatan byggi eg á, at viðurskiftini eru smá, og relatiónirnar tættar, tað verið seg vegna familju ella kennskap. Tí er bæði ein ávísur vandi fyri, at rot kann koma í skipanirnar, eins væl og at góður gróðrarbotnur er fyri illgitingum um hetta sama. Umboðsmaðurin er ein fínur máti, bæði at fáa staðfest um so er, ella at fáa illgitingar manaðar í jørðina.

Tað er eisini mín fatan, at umboðsmaðurin sum heild er væl móttikin í almennu fyrisitingini. Onkur tók sær átalurnar eitt sindur nær tey fyrstu árini, og tað hoyrdi eg eisini eitt sindur fyri, tá eg møtti kollegum úr fyrisitingini. Men hetta fjaraði skjótt, tá fleiri vóru fyri somu lagnu, so tað javnaði seg.

Eg haldi, at tað sum heild hevur gingið sera væl at fáa fyrisitingina at svara umboðsmanninum og at halda settar freistir. Men tað hevur undrað meg eitt sindur, at myndugleikar so ofta hava leitað sær uttanhýsis løgfrøðiliga hjálp at greiða umboðsmanninum frá einum máli, sum spurt verður um. Umboðsmaðurin biður um skjøl og spyr, hvat myndugleikin hevur bygt sína niðurstøðu á, men svarið kemur ofta frá onkrum, sum ikki hevur verið við í viðgerðini av málinum. Hetta átti sum oftast at verið óneyðugt, og tað bendir samstundis á, at fyrisitingin sær umboðsmannin sum ein mótstandara heldur enn viðspælara.

Men eg haldi, at tað er vert at hava í huga, at kritikkur frá umboðsmanninum í einum máli ikki altíð er keðiligur, og at hann ongantíð er persónligur, tvs. vendur ímóti tí einstaka fulltrúanum. Er orsøkin til trupulleikarnar vantandi arbeiðsorka, so kann hetta nýtast til at fáa eina hægri játtan. Í øðrum førum eigur kritikkurin at verða nýttur konstruktivt fyri at síggja, hvørjir batar kunnu gerast. Eg haldi, at t.d. Almannastovan er ein stovnur, sum hevur dugað hetta seinna sera væl í sambandi við tær kanningarnar, sum umboðsmaðurin hevur gjørt av útvaldum málum á Almannastovuni. Hóast hesin stovnur hevur fingið álagt alsamt fleiri uppgávur, uttan at játtanin til arbeiðið er økt samsvarandi, so hevur hugburðurin mótvegis umboðsmanninum alla tíðina verið, at hetta skal man royna at bøta.

Ofta verður sagt í Føroyum, at einki fær avleiðingar her í landinum; her verður óiva sipað til tænastuligar ella politiskar avleiðingar. Men her er vert at hava í huga, at umboðsmaðurin hevur ongan áhuga í, um mál fáa tænastuligar avleiðingar ella ikki. Fyri hann snýr tað seg um, at feilir verða rættaðir og neyðugir batar framdir, so feilirnir ikki henda aftur. Tað er latið upp til fyrisitingarskipanina sjálva at meta um, hvørt mál skulu hava tænastuligar avleiðingar.

Ein hugburður, sum hevur lyndi at taka seg upp nógva staðni í nútíarsamfelagnum, er, at feilir ikki mugu henda; vit kunnu kanska kalla tað eitt slag av null-hugsjón, ið eftir mínum tykki er drepandi fyri fyrisitingina. Har nógv mál eru, koma feilir at henda, tað slepst ikki undan hesum. Sjálvandi skal man royna at gera alt á besta hátt, men um man altíð vil binda væl og virðiliga um heilan fingur, so umboðsmaðurin ongantíð hevur nakað at finnast at yvirhøvur, so er vandi fyri, at mál ikki verða avgreidd til tíðina. Einasti veruligi feilurin, sum kann henda, er tá myndugleikar ikki vilja rætta gjørdar feilir, men fyri ein hvønn prís vilja halda fast.

Tey bæði ráðini, sum eg arbeiði fyri í dag, Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið hava eisini fingið sín part av kritikkinum. Men har er eisini fokus á trupulleikanum, og man roynir at gera alt fyri, at líknandi mál ikki skulu endurtaka seg. Men at verja seg heilt kann man ongantíð, tí hóast vit javnan frá ávísum politikarum hoyra, at miðfyrisitingin er ov stór, so er hon kortini lítil, sárbar og veik, tá hugsað verður um tær uppgávur, sum hon skal røkja, og tey lógarkrøv hon skal liva upp til.

Tað er heldur ikki altíð, at fyrisitingin sjálv sleppur at seta dagsskránna fyri, hvussu skjótt mál kunnu avgreiðast, tí teir alsamt vaksandi og við hvørt meiningsleysu fyrispurningarnir úr Løgtinginum tyngja arbeiðið munandi. Hesir skulu svarast til ásetta freist, og tað ger, at onnur mál, sum ikki hava slíkar freistir, koma at bíða.

Hóast tað nú eru næstan 3 ár, síðani eg gavst í starvinum sum ráðgevi hjá umboðsmanninum, so stendur hetta embætið framhaldandi mínum hjarta nær. Hetta kennist á onkran hátt eisini sum mítt barn, ið eg fylgi við spenningi.

Eg fari at enda við at ynskja samfelagnum Føroyar hjartaliga tillukku við 10 ára degnum hjá umboðsmanninum og at ynskja umboðsmanninum og starvsfólkunum blíðan byr í komandi tíðum.

Men spurningurin um, hvussu henda skipan fer at gagna samfelagnum frameftir, liggur ikki bara í hondum umboðsmansins, men minst líka nógv í hondunum á samfelagnum, bæði tí útinnandi og tí løggevandi valdinum. Tí tað er upp til teirra, hvussu umboðsmansskipanin verður móttikin, vird og harvið gagnnýtt til frama fyri rættarsamfelagið Føroyar.

**Takk fyri.**